## Danmark tapti

Nakrir HM-undandystir vóru í gjárkvøldið, sum eisini bjóðaði upp á tíggjutals vinardystir. Teirra millum var dysturin millum Danmark og Chile. Í einum ógvuliga hart spældum dysti mátti Danmark taka til takka við einum tapi upp á 1-2. Eftir ein málleysan fyrra hálvleik skoraði Esteban Paredes í 61. minutti fyrsta málið. Bert ein minutt seinni javnaði landsliðsdebutanturin, Lasse Schøne, fyri Danmark. Gleðin var tó stokkut, tí einans seks minuttir seinni avgjørdi Alexis Sanchez dystin eftir einum mistaki frá einum øðrum debutanti, Kris Stadsgaard.




## Sjey um boðið

Flestu serfrøðingar í enskum fótbólti eru á einum máli um, at kappingin um meistaraheitið komandi lekár fer at standa millum Chelsea og Manchester United. Men Didier Drogba hevur eitt breiðari boð. Hann roknar nevniliga við, at tað verða sjey feløg, sum fara at kappast um meistaraheitið. Hann metir, at umframt vanligu »top-four«, sum eru Arsenal, Chelsea, Liverpool og Manchester United, fara eisini nýríku Manchester City, Aston Villa og Tottenham at blanda seg í kappingina um enska meistaraheitið 2009/2010, skrivar enska blaðið The Sun.

# ...yskum stigi



Sjáldan hevur Nicolas Anelka verið so lítið sjónligur sum hann var í tepra sigrinum, sum franskmenn háluðu heim í gjárkvøldið. Súni Olsen var ein teirra, sum syrgdi fyri, at talan gjørdist um eitt ógvuliga tepurt tap

Mynd: Jens Kr. Vang

## Føroyar-Frakland 0-1 (0-1)

**HM undankappingardystur**
**mikudagin 12. august kl. 17.00 á Tórsvølli**

**Dómarakvartett úr Grikkalandi:** Michael Koukoulakis, Cristos Gennaios, Dimitrios Bozatzidis og Anastasios Kakos
**Dómaraeygleiðari úr Russlandi:** Nikolay Levnikov
FIFA eygleiðari úr Onglandi: George Courtney
**Áskoðarar:** 2.974
**0-1:** André-Pierre Gignac 41.
**Føroyar:** 1. Jákup Mikkelsen, liðformaður, 63/-142, KÍ - 2. Jónas Þór Næs, 8/0, Hvidovre IF, 5. Egil á Bø, 8/0, EB/Streymur, 4. Atli Gregersen, 2/0, 3. Jóhan Troest Davidsen, 12/0, NSÍ – 11. Bogi A. Løkin, 8/1, NSÍ, 6. Atli Danielsen, 32/0, KÍ (17. Jann Ingi Petersen, 13/0, NSÍ, 42.), 9. Súni Olsen, 35/2, Víkingur (14. Jákup á Borg, 58/2, B36, 85.), 7. Fróði Benjaminsen, 53/3, HB, 8. Símun Samuelsen, 24/1, Keflavík – 10. Christian Lamhauge Holst, 15/2, Silkeborg IF (18. Jóan Símun Edmundsson, 1/0, B68, 28.).
**Gult kort:** Atli Gregersen 18., Fróði Benjaminsen 45., Jónas Þór Næs 74.
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Gunnar Nielsen, Manchester City, 1/-1, 15. Bartal Eliasen, 5/0, ÍF, 13. Einar T. Hansen, 6/0, NSÍ, 12. Christian Høgni Jacobsen, 47/2, NSÍ
**Venjari:** Brian Kerr
**Hjálparvenjarar:** Jens Martin Kundsen og Abraham Løkin
**Frakland:** 1. Hugo Llores, Olympique Lyon - 2. Bakary Sagna, Arsenal FC, 5. William Gallas, Arsenal FC, 4. Julien Escude, Seville FC, 13. Patrick Evra, Manchester United - 6. Lassana Diarra, FCG Bordeaux, 14. Jéremy Toulalan, Olympique Lyon, 8. Yoann Gourcuff, FCG Bordeaux - 11. André-Pierre Gignac, Toulouse FC, 9. Nicolas Anelka, Chelsea FC 15. Florent Malouda, Chelsea FC (7. Frank Ribery, Bayern München, 65.)
**Gult kort:** eingin
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Steve Mandanda, Olympique De Marseille, 3. Eric Abidal, FC Barcelona, 10. Karim Benzema, Real Madrid FC, 12. Loic Remy, OGC Nice, Sébastian Squillaci, Seville FC, 18. Alou Diarra, FCG Bordeaux
**Venjari:** Raymond Domenech



Eingin spardi seg í nærdystunum og allir góvu seg heilt

Mynd: Jens Kr. Vang